

## »Sparfrúgv« til kvinnur

Føroya Sparikassi hevur tikið stig til at seta á stovn ein íløguklubba fyri kvinnur, og nú hevur klubbin so eisini fingið navn. Kapping varð skrivað út um hetta, og hesa vann Bjørgfinnur Nielsen, sum skeyt upp, at navnið skuldi verða Sparfrúgv. Eitt navn, sum bæði vísir til hugtakið um at spara, eins og næst hægsti sjavs-trumfurin gevur orðinum eina ávísa vekt, sum hann tekur til.

## Vilja hava greiðu á skattaskjólum

Seinasta árið hava útlendskir grunnar gjørt íløgur fyri íalt 120 mia kr. í donskum vinnulívi. Fyri ein stóran part hoyra hesir grunnar heima í skattaskjólum á eitt ú Cayman-oynnum, og nú skattamálaráðið hava skil á, hvaðani pengarnir stava. Kristian Jensen, skattamálaráðharri, sigur, at skattavaldið í løtuni er í ferð við at kanna peningastreymin í seks stórum donskum fyritøkum, soleiðis at eitt yvirlit kann gerast yvir, hvat veruliga gongur fyri seg.

# an




*Maðurin til vinstru á myndini er Reynir Georgsson, útgerðarstjóri hjá Brim Seafood í Íslandi. Hinir báðir eru skipararnir, Eyðfinn Jacobsen (í miðjuni) og Agnar Joensen*

*Mynd: Rógvi Joensen*

fraklendingar byrjaði við, at ein franskur reiðari og ein skipari vóru í Føroyum fyri umleið trimum mánaðum síðan og sluppu at síggja, hvussu partrol virkar umborð á ísfiskatrolarunum, Baki og Stelki.

– Vit seldu teimum trol og grunn og fóru til Fraklands at hjálpa teimum at rigga reiðskapin til. Síðan fóru tveir royndir føroyskir skiparar, Agnar Joensen og Eyðfinn Jacobsen, út við skipunum tann fyrsta túrin at læra teir tað grundleggjandi við partroli.

Rógvi sigur, at afturmeldingarnar, sum felagið síðan hevur fingið úr Fraklandi, eru framúrskarandi, og fraklendingar eru sera væl nøgdir.

– Royndin hjá hesum felag hevur ført við sær, at onnur reiðaríir í Fraklandi eisini hava vent sær til okkara.

Bæði Agnar og Eyðfinn eru royndir við partroli. Agnar hevur verið við heilt frá byrjan, og Eyðfinn hevur roynt í eini 15-16 ár við partroli.

### Í Íslandi

Men Vónin hevur ikki bara verið í Fraklandi og lagt reiðaríum og trolmonnum lag á.

– Fyri trimum vikum síðan vóru vit eisini í Íslandi og løgdu einum reiðaríi, Brim Seafood, lag á. Hetta er eitt stórt felag, sum ræður yvir næst flestu fiskiveiðikvotunum í íslendskum sjógvi.

– Eg og Agnar Joensen vóru fyrst á Akureyri og hjálptu teimum at rigga reiðskapin til - og kunnaðu teir um, hvussu vit gera. Síðan fóru Agnar og Eyðfinn sum serfrøðingar og royndir skiparar út við skipunum, ein umborð á hvørjum skipi.

Rógvi sigur, at Vónin hevur frætt úr Íslandi, at skipini hava havt góð úrslit, síðan teir byrjaðu at partrola.

– Trol og grunnur, sum vit hava latið teimum, hava riggað óføra væl, og sjálvt partrolara-prinsippið, sum hann rópar tað, er við at koma upp á pláss hjá teimum.

### At fáa í lag

Men slíkt samstarv kemur ikki í lag av sær sjálvum, og tí spurdu vit Rógva Joensen, hvussu Vónin soleiðis er komin út um landoddarnar við sølu av reiðskapi og vitan.

- Tað fyrsta, eg gjørdi, tá ið vit royndu okkum í Íslandi, var at bjóða útgerðarstjóranum hjá Brim Seafood, sum eg hevði møtt har yviri, heim til Føroya. Maðurin er Reynir Georgsson, og hann slapp umborð á Jaspis og Ametyst at hyggja, hvussu alt riggar. Reynir var rættiliga hugtikin og fór síðan aftur til Íslands at royna at sannføra leiðsluna í felagnum um, at partrol er nakað, sum vert er at royna.

Rógvi sigur, at boð komu aftur úr Íslandi við fyrispurningi um, hvørt tveir skiparar hjá teimum kundu sleppa umborð á tveir partrolarar at síggja, hvussu hetta riggar.

– Hetta vóru skilamenn, sum komu úr Íslandi, men tá ið teir komu til Føroya, tóktust teir heldur negativir og vístu seg ikki at vera nakað serligt við upp á hetta. Teir sluppu umborð á Safir og Smaragd – men tá ið teir komu í land aftur, vóru teir meira positivir og sóu møguleikar við hesum veiðihátti.

Seinni kom so endaligur fyrispurningur úr Íslandi um veiting av reiðskapi og vitan til at koma í gongd.

### Í fremstu røð

Rógvi sigur, at síðan teir leveraðu reiðskap og "know how" til íslendska felagið, eru nógv vakin eygu í Íslandi, sum fylgja við, hvussu gongst hesum trolarapari.

– Eg haldi ikki, at vit føroyingar standa aftanfyri aðrar, tá ið ræður um veiði í baldrutum sjógvi og á ringum botni. Vit hava nógva vitan, sum vit kunnu selja til aðrar. At selja trol og reiðskap er í sær sjálvum eingin trupulleiki, men tað týdningarmesta í slíkum føri er, at keyparar duga at brúka reiðskapin, so hann kemur til størstu nyttu.

Rógvi Joensen leggur dent á, at hetta er reiðskapur og vitan, sum Vónin saman við nógvum skiparum – og ígjøgnum mong ár – hevur ment til tað, hann er í dag.

– Íslendingar og aðrir hava lært okkum nógv, men í hesum førinum eru tað vit, sum læra aðrar, og eg ivist onga løtu í, at føroyingar á hesum øki – og øðrum við - kunnu læra umheimin nakað, sum vit duga betri enn flestu aðrir, sigur hann.

# Burðardygg vinna

**Hóast kappingin er herd, so er grundarlagið undir Vónini somikið sterkt, at felagið væl og virðiliga megnar at standa ímóti broytingum**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Verður hugt at roknskapunum hjá P/F Vónini fyri seinastu fýra árini, so er einki at ivast í, at talan er um eina sunna fyritøku. Samanlagda yvirskotið hevur hesi árini verið góðar 35 mió kr., og tað hevur givið eina góða renting av eginognini. Somikið góða, at tað hjá partaeigarunum helst er vorðin ein spurningur um, hvørt tíðin ikki er komin at luta út størri upphæddir í vinningsbýti, soleiðis at eginognin ikki gerst ov stór lutfalsliga við einum ov lágum eginpeningsavkasti sum avleiðing.

### Herd kapping

Í ársfrágreiðingini til roknskapin verður sagt, at felagið ikki roknar við einum eins góðum úrsliti í 2006, sum felagið hevði í fjør, og hetta kann helst hava fleiri orsøkir. Ein tann týdningarmesta man tó vera kappingin, sum á heimamarknaðinum er herd, nú annað trolvirkið eisini er sett á stovn.

Hinvegin hevur Vónin væl og virðiliga nakað at standa ímóti við. Sunni raksturin hevur styrkt munandi um grundarlagið undir fyritøkuni. Eginpeningurin var við árslok 2005 79% av samlaða fíggjarjavnanum (soliditetur), og gjaldførislutfallið var ikki minni enn 377, sum er óvanliga høgt fyri eina fyritøku við somikið stórari javnvág.

Á Vónini starvaðust í 2005 76 fólk.

| P/F Vónin | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Høvuðstøl (tkr.)** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
| Bruttovinningur | 33.416 | 35.579 | 28.319 | 31.463 |
| Úrslit áðrenn rentur | 10.298 | 11.876 | 6.192 | 7.402 |
| Ársúrslit | 11.164 | 9.900 | 6.488 | 7.507 |
| | | | | |
| Støðisogn | 33.848 | 36.220 | 35.674 | 34.245 |
| Ogn í umferð | 42.041 | 46.592 | 46.859 | 58.246 |
| | | | | |
| Eginpeningur | 47.142 | 54.942 | 59.232 | 73.239 |
| Skuld íalt | 28.747 | 27.870 | 23.301 | 19.252 |
| Fíggjarjavni | | | | |
| | | | | |
| **Lyklatøl** | | | | |
| Ognaravkast | 14 | 14 | 8 | 8 |
| Eginpeningsavkast | 29 | 22 | 13 | 12 |
| Soliditetur | 62 | 66 | 72 | 79 |
| Gjaldførislutfall | 231 | 222 | 245 | 377 |
| | | | | |
| **Móðurfelag hjá:** | | | | |
| **Qalut Vónin A/S** | 75% | | | |
| Vónin Canada Ltd. | 75% | | | |
| Hopedale Ltd, Canada | 100% | | | |
| Sp/f Skipshandilin | 100% | | | |
| | | | | |
| **Høvuðspartaeigarar:** | | | | |
| P/F Tjaldur, Tórshavn | | | | |
| Olaf Olsen, Glyvrar | | | | |
| Otto C. Dam, Argir | | | | |
| Janus av Reyni, Tórshavn | | | | |
| Sámal G. Jacobsen, Fuglafjørður | | | | |
| Sp/f R.M., Fuglafjørður | | | | |
| Philip K. Muinde, Aberdeen | | | | |
| P/F Palli hja Mariannu | | | | |